Tit ringja — vit skriva
Er nakað á vási? — hvamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara.
Vit eru til reiðar!
Telefon 118 20 - Telefax 147 28

tíðindablaðið **sosialurin**

Lýsingar
Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran
Telefon 118 20 - Telefax 147 28

veðrið

Av leiðunum millum hátrýstið yvir Danmark og lágtrýstið vestanfyri Írland rekur út á fríggjadagin lýggj og slavin luft av suðri og landsynningi móti Føroyum. Lágtrýstið, sum væntandi rekkur Føroyum mánadagin, hevur regn við sær.

Fríggjadagin

Lot upp í frískt lot, 5–10 m/s, av útsynningi, lutvíst ódrigið, hendinga æl, annars toluligt ella gott sýni og eisini sólarglottar. Hitin um dagin upp í 15 stig. Út á kvøldið makari lot av suðri, vánaligari sýni og mjørki sum líður á náttina. Hitin leygarnáttina uml. 10 stig.

Leygardagin

Bert lítið lot upp í gul, 3–8 m/s, av landsynningi, ódrigið, bert toluligt sýni, men mestsum turt. Hitin upp í 15 stig.

Sunnudagin

Gul upp í strok í vindi, 8–13 m/s, av landsynningi, ódrigið, regn sum líður á dagin og bert toluligt sýni. Hitin millum 10 og 15 stig.

Mánadagin og týsdagin

At byrja við framvegis upp í strok, 13 m/s, av landsynningi, ódrigið, regn og bert toluligt ella vánaligt sýni. Seinni lítið lot upp í gul, 3–8 m/s, av suðri, okkurt ælið, men toluligt ella gott sýni og sólarglottar. Hitin um dagin millum 12 og 17 stig.

Marita Petersen, løgmaður:

Sjálvandi skal vinnan vera við í oljunevndini

Marita Petersen, løgmaður: -Tað er sera týdningarmikið, at vinnan er umboðað í oljuráðleggingarnevndini, soleiðis at hon fær fyrireikað seg og kann gera vart við teir møguleikar, hon sær í eini komandi oljuvinnu. Hon tekur fult undir við formanninum í Føroya Oljuídnaði, at tað hevur stóran týdning, at vinnan er við til at tilrættaleggja eina komandi oljuvinnu.

-Tað má vera ein misskiljing, tá tað verður sagt, at landsstýrið ikki ynskir, at vinnan í Føroyum skal vera við í oljuráðleggingarnevndini og harvið vera við til at kanna møguleikar og fylla út karmar fyri eini komandi oljuvinnu. Landsstýrið hevur beint tvørturímóti ta fatan, at tað er sera týdningarmikið, at vinnan er við í fyrireikingunum longu nú.

Hetta sigur Marita Petersen, løgmaður í eini viðmerking til úttalilsini hjá formanninum í Føroya Oljuídnaði, Magna Arge í SVF í vikuni, har hesin vísti ónøgd sína við, at vinnan ikki hevði umboð í nevndini.

Marita Petersen sigur, at tað longu í apríl mánað varð avgjørt, at vinnan skal hava tvey umboð í nevndini umframt teir mongu serfrøðingarnar á ymsum økjum, sum landsstýrið hevur valt í nevndina. Oljuráðleggingarnevndin hevði fund í vikuni og vísir løgmaður á, at tað av ymiskum orsøkum ikki eydnaðist at fáa valt vinnuumboðini í nevninda undan hesum fundinum.

Hetta kemur fyrst og fremst av tí, at arbeiðsbyrðan í Tinganesi hevur verið so stór. Men ætlanin er í hesi vikuni at fáa valt umboðini. Løgmaður sigur, at tað enn ikki er avgjørt, um tað er landsstýrið, sum skal peika hesi fólkini út ella tað skal vera upp til vinnuna sjálva.

jan

Lønarniðurskurðurin var avgerandi fyri samgonguslitið

Hóast atburðurin hjá Svend Aage Ellefsen og John Petersen spældi nógv inn, so var tað serliga krav fólkafloksins um 30% lønarniðurskurð við lóg, sum var avgerandi fyri samgonguslitið

Vit høvdu í gjár samrøðu við Maritu Petersen um farna valskeið.

Komið var eisini inn á samgonguslitið, og har vísti Marita Petersen serliga til atburðin hjá John Petersen og Svend Aage Ellefsen sum orsøk til slitið.

Teir elvdu til klandur og kegl um hvørt smámál, og oyðiløgdu við sínum støðuga brigsli samstarvsandan í Tinganesi.

- Tað er beint, at hetta var ein orsøk til slitið, sigur Marita. Men hetta var kortini ikki høvuðsorsøkin.

Ímóti saneringini

Fyri at eingin misskiljing skal koma, vil hon fegin hava við, at tað fyrst og fremst var tann politiska ósemjan, sum elvdi til, javnaðarflokkurin gjørdi av at seta fólkaflokkin á dyr.

- Fyrst var tað saneringin av flakavirkjunum, sum teir kravdu lóggávu ímóti. Teir lovaði enntá at siga samgonguna upp, um hetta varð framt.

Lønarniðurskurður

- Harafturat kravdi fólkaflokkurin, at allar lønir skuldu skerjast við 30%. - Og tað skuldi gerast við lóg!

Hetta kundu vit ikki undir nøkrum umstøðum ganga við til, greiðir Marita frá.

- Tað var serliga hesin politiski mótsetningur millum flokkarnar, sum gjørdi, at vit valdu at lova øðrum fólki framat.

Heykalyndi

Í Sosialinum í gjár er Atli Dam annars inni á tí sama. Hann skrivar, at fólkaflokkurin »legði eina øgiliga orku í at troðka lóggivnan lønarniðurskurð ígjøgnum«.

Men hann vísir eisini á, at atburðurin hjá Svend Aage og John Petersen spældi inn.

Hann skrivar: »Tá so á vári 1993 stóð greitt, at teir ikki fóru at gevast á hondum, og Svend Aage Ellefsen og John Petersen nærum dagliga avdúkaðu sítt harðrenda heykalyndi í berserkaragongd í Tinganesi, stóð greitt, at slitið mátti koma«.

s-s-

Vestfalskyrrindi

30. juni: Seinna kvarter
7. juli: Mánin longst frá jørðini
5. juli: Jørðin longst frá sólini

Dato	Suðuroyar-/ Vágafirði		Vestmanna-sundi		Nólsoyar-firði		Haraldssundi/ Leirvíksfirði		Skúvoyarfirði/ Skopunarfirði		Hestfirði/ Sandalagnum	
	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.
1. juli	0148	1424	0348	1624	0003	1239	0203	1439	0048	1324	0103	1339
2. juli	0245	1506	0445	1706	0100	1321	0300	1521	0145	1406	0200	1421